# Vogts ivast

**Tað verður ikki fyrr enn í evstu løtu, at Berti Vogts ger av, hvørjar 18 leikarar hann tekur við til Føroyar**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Eftir ætlan skuldu vit longu í blaðnum í gjár kunna sagt, hvussu endaligi skotski hópurin móti Føroyum fer at síggja út. Frá sktotskum miðlum vóru boðini undan vikuskiftinum nevnliga, at Berti Vogts longu mánamorgunin fór at gera av, hvørjir sjey leikarar skulu sáldast úr 25-manna stóra bruttohópinum, men tað tykist tó kortini, sum um venjarin hevur nakað at hugsa um.

Týsmorgunin vóru boðini úr skotska fjølmiðlaheiminum nevnliga broytt. Nú væntaðu teir ikki, at Vogts fór at taka endaliga hópin út fyrr enn týskvøldið. T.v.s. eftir evstamark okkara. Høvuðsorsøkin til hetta er, at fleiri av lyklaleikarunum hjá Vogts hava onkrar smávegis snuddir, men eisini er spenningurin stórur, hvørt løku avrikini móti eitt nú Danmark herfyri fara at fáa avleiðingar fyri onkrar av meira royndu leikarunum.

Eitt nú fanst Vogts eftir dystin moti Danmark at teimum báðum, Paul Lambert og Barry Ferguson, sum báðir mugu roknast fyri avgjørdu lyklaleikararnar á liðnum. Hálva vegna varð spurningur settur, um teir ikki líktust ov nógv í spælistíli, og um pláss tískil var fyri báðum teirra á vøllinum.

Skotsku miðlarnir rokna tó fyri víst, at teir báðir vera við í hópinum, men spurningurin er kanska, um Vogts torir at taka báðar teirra út, fyri síðani at seta annan á beinkin.

Sum sagt skuldi endaligi hópurin hjá Skotlandi takast út eftir evstamark okkara týsdagin, og verður meira helst at frætta um hetta í blaðnum í morgin. Teir 25 í skotska bruttohópinum vóru ananrs hesir:

Neil Alexander (Cardiff), Robert Douglas (Celtic), Paul Gallacher (Dundee), Graham Alexander (Preston), Stephen Crainey (Celtic), Christian Dailly (West Ham), Maurice Ross (Rangers), Robbie Stockdale (Middlesbrough), David Weir (Everton), Lee Wilkie (Dundee), Barry Ferguson (Rangers), Scot Gemmill (Everton), Paul Lambert (Celtic), Derek McInnes (WBA), Kevin McNaughton (Aberdeen), Dominic Matteo (Leeds), Gary Naysmith (Everton), Scott Severin (Hearts), Gareth Williams (Nottingham F.), Stephen Crawford (Dunfirmline), Paul Dickov (Leicester), Scott Dobie (WBA), Allan Johnston (Middlesbrough), Kevin Kyle (Sunderland), Steven Thompson (Dundee)

## Støðan, 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 6 | 6 - 0 - 0 | 35 | 6 | 29 | 21 |
| 2 | B36 | 6 | 4 - 0 - 2 | 13 | 11 | 2 | 14 |
| 3 | HB | 5 | 2 - 0 - 3 | 11 | 9 | 2 | 6 |
| 4 | GÍ | 4 | 2 - 0 - 2 | 6 | 17 | -11 | 6 |
| 5 | B68 | 4 | 1 - 0 - 3 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 6 | Skála | 5 | 0 - 0 - 5 | 6 | 25 | -19 | 0 |

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 14 | 9 - 3 - 2 | 29 | 13 | 16 | 30 |
| 2 | HB | 14 | 9 - 2 - 3 | 40 | 17 | 23 | 29 |
| 3 | KÍ | 14 | 9 - 2 - 3 | 34 | 16 | 18 | 29 |
| 4 | GÍ | 14 | 8 - 1 - 5 | 26 | 22 | 4 | 25 |
| 5 | B36 | 13 | 7 - 2 - 4 | 39 | 20 | 19 | 23 |
| 6 | B68 | 13 | 5 - 5 - 3 | 19 | 18 | 1 | 20 |
| 7 | VB | 14 | 4 - 4 - 6 | 10 | 12 | -2 | 16 |
| 8 | EB/Streymur | 14 | 3 - 2 - 9 | 16 | 34 | -18 | 11 |
| 9 | TB | 14 | 1 - 3 -10 | 13 | 50 | -37 | 6 |
| 10 | Skála | 14 | 0 - 4 -10 | 9 | 33 | -24 | 4 |

# Ujpest venjarin sekkjaður

**Alment er frágreiðingin, at Molnar ikki hevði neyðugu loyvini, men tað er sannlíkt, at avrikini móti KÍ høvdu sína ávirkan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast klaksvíkingar - eins og føroysk lið vanliga gera - máttu siga farvæl við Europa eftir fyrsta undankappingarumfar, so var góða avrikið hjá KÍ ein dyggur smeitur hjá ungverska Ujpesti.

Einki er at ivast í, at bæði venjari, leikarar og ikki minst viðhaldsfólkini høvdu roknað við einum tryggum samanløgdum sigri móti føroysku umboðunum, men sum kunnugt, so gekk tað altso bara akkurát hjá Ujpesti at basa føroyingunum, og teir skulu vera glaðir um, at tað hóast alt endaði við sigri í Ungarn.

Nú tykist hetta eisini hava fingið avleiðingar í felagnum. Á heimasíðuni hjá KÍ vita tey í øllum førum at siga, at Ladislav Mólnar, nú er sagdur úr starvinum sum venjari hjá felagnum. Alment er frágreiðingin, at hann ikki hevur neyðugu UEFA-góðkenningina, men tað er neyvan ov langt av leið at rokna við, at avrikini ímóti KÍ hava havt sín stóra leiklut í hesum.

## Talvið hesa vikuna

Talvið er frá kapping í Ukraina í mai, har Karjakin vann sín næsta GM-norm.

**Khudyakov - Karjakin**
**Alushta 2002**

1.Rif3 d5 2.c4 dxc4 3.Fa4+ Ric6 4.Fxc4 e5 5.d3 Bd6 6.g3 Rige7 7.Bg2 Be6 8.Fa4 f6 9.Ric3 Fd7 10.Rie4 Rif5 11.Rixd6+ cxd6 12.e4? **(12. 0-0 hevði verið betur. Nú er d4 feltið klárt hjá svørtum at eiga) Rifd4 13.Be3 (Borg hevði eisini her verið besta val)** Bh3!



14.Bxh3 Rixf3+ 15.Ke2 Ricd4+ og hvítur missir frúnna 0-1

# 12 ár og stórmeistari

**Ukraina er í fullum talvblóma við FIDE-heimsmeistaranum Ruslan Ponomariov á odda. Nú eiga teir eisini yngsta stórmeistara nakrantíð, Sergei Karjakin**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tá 17 ára gamli Garry Kasparov í 1980 bleiv stórmeistari, var hetta tá ein sera ungur aldur at fáa hendan fína tittul. Bobby Fischer var tó í serflokki, tí hann bleiv longu stórmeistari sum 15 ár og seks mánaðir gamal (1959). Ikki fyrrenn í 1991 bleiv aldursmetið hjá Fischer tikið tá Judit Polgar fullkomuliga óvæntað gjørdistv stórmeistari, tveir mánaðir yngri enn Fischer.

| Player | Fekk seinasta GM-normin sum |
|---|---|
| Bobby Fischer | 15 ár, 6 mánaðir, 1 dag |
| Judit Polgar | 15 ár, 4 mánaðir, 28 dagars |
| Peter Leko | 14 ár, 4 mánaðir, 22 dagars |
| Etienne Bacrot | 14 ár, 2 mánaðir, 0 dagars |
| Ruslan Ponomaryov | 14 ár, 0 mánaðir, 17 dagars |
| Teimour Radjabov | 14 ár, 0 mánaðir, 14 dagars |
| Bu Xiangzhi | 13 ár, 10 mánaðir, 13 dagars |
| Sergey Karjakin | 12 ár, 7 mánaðir, 0 dagars |

(kelda: www.chessbase.com)

Ponomariov og Radjabov hava báðir telvað í Føroyum, og báðir hava eisini einaferð verið yngstu stórmeistarar í heiminum. Síðani teir í oktober 2000 luttóku í 3rd Tórshavn International í Norðurlandahúsinum, er mangt hent innan talvlív teirra. Radjabov bleiv stutt seinni yngsti stórmeistari í heiminum, og Ponomariov gjørdi ikki mætari enn at gerast Fide-heimsmeistari í januar 2002.

Sergei Karjakin, føddur 12. januar 1990, gjørdi skjótt av á vegnum til stórmeistaratittulin. Í januar vann hann sær fyrsta GM-normin, í mai tann næsta, og í august ognaði hann sær triða- og avgerandi GM-normin. Og eisini er hann komin yvir um 2500 markið í rating, sum er krav fyri at fáa stórmeistaratittulin.

### Hjálpti heimsmeistaranum

Tá Ponomariov leikti HM-finaluna móti Ivanchuk fyrr í ár, hevði hann ein lítlan pilt at hjálpa sær við fyrireikinginum til hendan týðandi talvdyst, nevnliga 12 ára gamla Karjakin. Hetta vakti ans, og spurningur varð settur, um hesin ungi maðurin veruliga kundi hjálpa Ponomariov. Men fakta varð, at Ponomariov vann HM-dystin, og nú er Karjakin vorðin yngsti stórmeistari nakrantíð. Hansara rating er í løtuni 2523.

### Flóvin reisti seg

Eftir miseydnaða kapping í Hollandi, har hann misti útvið 50 ratingstig á føroyska ratinglistanum, royndi Flóvin Tór Næs seg aftur í opnari kapping í Týsklandi. Væl betur gekst hesaferð, og fekk hann seks stig av níggju møguligum. Hetta gevur honum umleið eini 15-20 ratingstig.

Flóvin hevur verið sera aktivur hetta summarið við heili fýra kappingum í skjáttuni. Sum heild hevur summarið eydnast væl hjá honum, ikki minst við sínum IM-normi í juli mánaða.




# Prísur á pappi og pappíri til endurnýtslu

Frá 1. september 2002 eru fylgjandi prísir galdandi fyri turt og reint papp og pappír til endurnýtslu.

| Tilfar | kr/m3 |
|---|---|
| Bara papp, heintað | 90,00 |
| Bara pappír, heintað | 90,00 |
| Blandað pappír og papp, heintað | 120,00 |

Hvítur virkisposi: kr. 15,00 pr. stk.
Allir prísir uttan MVG.

- Pappír er tíðindabløð, vikubløð, tíðarrit, lýsingarbløð, kopipappír og annað reint pappír.
- Papp er pappeskjur og annað reint, turt og óviðgjørt bylgjupapp ella kartonpapp.
- Prísirnir eru fyri leyst papp og pappír. Leysprísurin verður faldaður við 3, um papp ella pappír eru samantrýst.
- Avtalað kann gerast um levering av pappi ella pappír.
- Meira fæst at vita um burturkast á www.irf.fo

IRF

# Egnarir

Søkt verður eftir accord egnarum, at byrja beinanveg.

**Tlf. 444385, 444409 ella 289435**

# Til Leigu

**Sethús í Tórshavn - A. C. Evensensgøta 18**

Húsini eru í tveimum hæddum.
Stovuhædd: gongd, køkur, vaskirúm, stova og hjallur.
Loftshædd: 3 kømur og baðirúm.
Húsini eru vælhildin og standa í friðarligum umhvørvi við sera góðum útsýni, tætt við fríøki, barnagarð og skúla.

Skriva til: hustilleigu@hotmail.com og sig eitt sindur um tykkum sjálvi, og hvat tit vilja gjalda.

Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Klinikkassistentar til Tannlæknastovuna**

At seta skjótast til ber er eitt fulltíðarstarv og eitt hálvtíðarstarv sum klinikkassistentur.

**Løn**
sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Sigrid Arge, tannlæknastjóra, tlf.312772, fax 312454 ella teldupost: sigrid@torshavn.fo.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 23. september 2002.

SNARSKIVAN

# Søkt verður eftir fólki til skaða- og tryggingardeildina

Starvið er í høvuðsheitinum at sýna skaðar á akfør og farm.
Eisini skal viðkomandi gera upp og hava eftirlit við møguligum umvælingum av skaðum.

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at sýna og umvæla skaðar, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum.
Alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

**SMYRIL LINE**
att.: stjórnin
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

# Toyota Avensis

til sølu um hóskandi boð fæst.

Bilurin hevur alt í útstýri, í góðum standi, og sær gott út.

2.0 Turbo Diesel. 172000 km. Er frá '98 grønur.

4 vetrardekk á felgum fylgja við.

**Tlf. 21 27 07 - 25 93 30**

# Norðoya Javnaðarfelag

Lýsti aðalfundurin er útsettur til 10. september kl. 20.00 í Bøgøtu 3.

**Nevndin**

**Vegna skeiðvirksemi er handil okkara stongdur frá fríggjadegnum 06.09.2002 til og við týsdagin 16.09.2002**

**Átrokandi boð kunnu sendast á fax 318101 ella ringjast á tlf. 312676 aftaná kl. 17.00**

A. H. Jensen
*alt innan reingerð*
Stoffalág 25 · tlf.: 322676 · fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo

Søkt verður eftir
# eftirlitsleiðara
(space controller)
til ferðamannadeildina

Starvið er í høvuðsheitinum eftirlit við bókingarskipanini:

1. Kømurum og koyggjum
2. Bildekk, nøgd og slag av akførum
3. Bólkabókingar
4. Fundarvirksemi
5. Matbókingar (pláss í matstovum)

Ert tú miðvís/ur, arbeiðssom/samur, tolin, hevur útbúgving og royndir í at handfara tøl, í góðum árum og ynskir at hoyra meira um starvið, so skriva nøkur orð um teg sjálvan og fá eina samrøðu við okkum, merk bræv »eftirlitsleiðari«, alt verður viðgjørt í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 12. september 2002.

P/F SMYRIL LINE
att.: stjórnin
Postboks 370
110 Tórshavn

**SMYRIL LINE**
**Tel. +298 345900**

# Ársveitsla

Landsfelag Pensjónistanna hevur ársveitslu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn tann 14. september.

Nærri upplýsingar fáa tit frá tykkara egna lokalfelag.

Tilmelding til tykkara felag seinast 9. september.

**Nevndin**